LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyrritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

AMBOÐ TIL TANN SERKØNA
HANDVERKARAN. Vit umboða: Makita, Alto, Bacho, Mikatronik. Dekk: 4 stk. 165x65x12 2.400 kr., 4 stk. 175x65x14 2.700 kr. og 4 stk. 185x65x15 3.100 kr. Eldsløkkjarar: Vit levera um alt landi. Leiga ein bil fyri sámuliga prís: Faroe Trade, Box 130, 110 Tórshavn, e.mail: trade@post.olivant.fo.
Tlf./Fax 317865 Mobil 224910

TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 95 til sølu. Bilurin hevur el-sóltak, eyka sett av felgum og tokulyktir framman.
Tlf. 216100

BMW 52.5
Turbo Diesel í góðum standi til sølu. Kom og hygg og royn bilin. Prísin tosa vit um. Ring
Tlf. 256078

OPEL KADET
Vøruvognur í góðum standi til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 424356/281305

TIL SØLU
Toyota Corolla frá 1989, koyrt 105.000 km, er í góðum standi, til sølu fyri 12.000 kr. Ring
Tlf. 284142/321142

TIL SØLU
Ford Sierra 2.0 stw., árg. 88. Hevur avhendingarkrók. Sýnaður 5/01. Er í góðum standi.
Tlf. 255754

BILAR TIL SØLU
Toyota Corolla ´86 bíliga til sølu. Ford Escort ´86 bíliga til sølu.
Tlf. 314465/253443

TIL SØLU
3 stk. Mazda 626 til sølu sum eykalutir, árg. 89.
Tlf. 210535/332535

TIL SØLU
Mazda 626 2.0D, 1987, koyrt 170.000 km. Nýsýnaður 9. nov 2001 + Mazda 626 83-87 sum eykalutir.
Tlf. 313824/222241 best eftir kl. 17.00

TIL SØLU
205/50-15 sportfelgur - CD6000 RDS, Nokia 3330 við bilsetti, 350W Sobbur við 1x100W forsterkara, alt til sølu fyri 10.000 kr., til Ford bílar. Ring aftaná kl. 18.00.
Tlf. 251716

SCANIA 82H
Ein Scania 82H, 4x2 við 11 tons krana og skiftilast. Sýnaður í des. 2001 til sølu.
Tlf. 213195 ella 444642

TIL SØLU
4 óbrúkt summardekk av merkinum Michelin Energy, stødd 195/65-R15 til sølu.
Tlf. 252971

VW GOLF 1,8
Árg. 88, 5H til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218998

TIL SØLU
Fýra nýggj summardekk 185/70/14 á felgum (5 hol) til sølu fyri kr. 2.400.
Tlf. 210542

TIL SØLU
Daihatsu Charade, nýsýnaður bíliga til søu.
Tlf. 361372

TIL SØLU
Ein lastbilur, Toyota Hilux, til sølu. Bilurin er frá 1991.
Tlf. 218158/318158

TIL SØLU
Pajero 4x4 í góðum standi. Nógvir eykalutir , nýggj dekk og bremsur til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 422241/264469

TIL SØLU
Kølari og kobling til Mazda 323, árg. 87, óbrúkt, bíliga til sølu. Ring
Tlf. 224259

TIL SØLU
Stoytdoyvarar til Maza 323, árg. 87. Ring
Tlf. 224259

DEKK TIL SØLU
Fýra lítið slitin summardekk, stødd 185/60-R14 til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 210686

TIL SØLU
DAEWOO Nubira st. car 2,0 s/x bíliga til sølu, árg. febr. 2000, hevur el-spegl og el-rútar. Pikadekk fylgja við. Ring á
tlf. 213737

FORD PUMA
Til sølu, árg. 2000, koyrt 7.000 km. Lítið brúktur og sær út sum nýggjur.
Tlf. 264928

TIL SØLU
Volvo FL 614, nýsýnaður lastvognur og ein Bobcat 763 beltimaskina 2,5 við eyka skuffu í góðum standi.
Tlf. 224630

BMW 316i TIL SØLU
árg. 10/96, koyrt 70.000 km, sóltak, sportfelgur, leðursetur.
Tlf. 221122

BILUR YNSKIST
Skal vera í sera góðum standi. Prísur ikki yvir 60.000 kr.
Tlf. 212934

MOTORUR
Bensin motorur til Ford Transit 89, (Ford Sierra 2.0) ynskist til keyps.
Tlf. 213695

TOYOTA CARINA II
XLI 2.0, árg. 90, nýsýnaður, til sølu.
Tlf. 375717 ella 222923

NISSAN PATROL
jeepur, 4wd, diesel, árg. 85 til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 332023 eftir kl. 16

SUMMARDEKK
Fýra summardekk við felgum bíliga til sølu – Dunlop 155-80R-13.
Tlf. 316447 ella 227443

FORD ESCORT 1.6
til sølu, sær gott út, hann hevur koyrt 84.000 km, fýra summardekk á felgum eru við. Bíliga til sølu.
Tlf. 217102

TIL SØLU
Toyota Corolla st., árg. 83, til sølu sum eykalutir. Góðar hurðar o.a.
Tlf. 211514

OPEL ASCONA
Árg. 86, 360.000 km, verður seldur fyri 10.000 kr. Bilurin krevur ábøtur, men koyrir væl. Ring á tlf. 314600 ella
227651 og spyr eftir Tórhalli

TIL SØLU
Ein VW Transporter, árg. 89, nýsýnaður, toppstykkið er farið.
Tlf. 223857 - 455986

TIL SØLU
Silvur gráur Renault 19 til sølu. Bilurin er frá árg. 11/94 og hevur koyrt 94000 km.
Tlf. 254111

BILFJAÐRAR
Lækkingar-fjarðar til at lækka tín bil 40 mm. Óbrúktar. Til Citroen Xsara, til sølu fyri 1.400 kr.
Ring 211057

TIL SØLU
Eitt sett brúkt OZ F1+ felgur & Bridgestone dekk 16 tummar 205 x 45. Passar til Citroen og Peugeot. Nýprísur 11.000, til sølu fyri 4.500 kr.
Ring 211057

TIL SØLU
Mazda B-Serieuf, árg. 98 til sølu. Koyrt 70.000 km.
Tlf. 423511

JEEPUR TIL SØLU
Galooper Jeepur stutta modelli til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er 2 ár og 11 mán. - sær gott út.
Tlf. 332165 ella 250657

TIL SØLU
Daihatzu Charade 1,3, árg. 89 við defektum automatiskum gearkassa, annars í góðum standi til sølu.
Tlf. 333042 ella 213342

DEKK OG FELGUR
4 nýggj heilársdekk, stødd 185/65 R14 á nýggjum felgum til sølu.
Tlf. 371042

OPEL ASCONA 1.6
Árg. 86. er í góðum standi, Pioneer CD-anlegg og hátalarar fylgja við til sølu fyri 6.500 kr.
Tlf. 455279/250951

TIL SØLU
Fiat TIPO 1.4 árg. 90, sýnaður í okt. 2001, ongan kross, galvanseraður, sær gott út, til sølu fyri uml. 15.000.
Tlf. 216956 ella 361546

ATIL SØLU
4 stk. Continental-dekk 185/60 R14, onki brúkt. Motorur til Ford Escort 1600 í góðum standi bíliga til sølu.
Tlf. 282098 ella 317298

TIL SØLU
Myrkagráur Opel Ascona 1,6 S, 4 hurðar, árg. 87, sóltak og alufelgur. Sýnaður í mai 2001. Koyrt 137.000 km. Ikki er roykt í bilinum. Bilurin er í hampuligum standi. Kostnaður 13.900 kr.
Tlf. 219510

TIL SØLU
Mazda 323 til sølu sum eykalutir fyri 4-5.000,00 kr.
Tlf. 321591 ella 252711

SUMMARDEKK
Fýra lítið brúkt summardekk á felgum 165/80 R13 til sølu.
Tlf. 447602

YNSKIST
Útstoyt til ein Nissan Sunny árg. 86 ynskist til keyps.
Tlf. 256049

TIL SØLU
Ein Volvo 244 1,9 - 1978 til sølu við eyka hurðum og felgum. Prísur: 2.000,- kr.
Tlf. 452067/255768

FIESTA 1.1
sum kann brúkast til eykalutir, hevur nýggj dekk og lyktir og anhangara, gjørdur burtur úr einum Fiesta, til sølu.
Tlf. 252058

BILUR YNSKIST
Japanari árg. 92-95, ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 224910

BILLUTIR
til BMW 318 TDS, árg. 96, til sølu.
Tlf. 218778

OPEL ASCONA 1.6
árg. 87, til sølu. Er best egnaður sum eykalutir. Kostnaður 4.500 kr.
Tlf. 251489

OPEL ASTRA
árg. 95, til sølu fyri 45.000 kr.
Tlf. 423236

FORD ESCORT 16V
árg. 95, í sera góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
312519/212519

Arbeiði

KVINNA SØKIST
Kvinna søkist til reingerð einaferð um vikuna.
Tlf. 313701

TILBOÐ YNSKIST
uppá umvæling og isolering av lofti skjótast gjørligt.
Tlf. 318133

YNSKIR KJANS VIÐ SKIPI
26 ára gamal jávari/føroyingur, raskur, álitandi og tolin, vanur við psykist útiarbeiði.
Tór sími 264339

YNSKJA ARBEIÐI
Vit eru tvær 14-15 ára gamlar gentur, sum ynskja arbeiði aftaná skúlatíð til lættari reingerð ella at passa børn í Runavíkar kommunu.
Tlf. 441435

VIT SÓKNAST
eftir tilkomnari, royndari vaskikonu 1 ferð um vikuna.
Tlf. 315624

ER
du lysten på et eventyrlig år i Nord-Norge? 2 familier i Bodø søker hver vår au-pair fra august 2002. I hver familie er det barn født i 1999. Barnepass, lek og aktivisering av barna vil bli hovedbeskjeftigelsen din.Vi søker etter to jenter som er nysgjerrige på å leve i Norge - ta del i norsk familieliv og erfare norsk kultur og natur. Bodø er en region med mange muligheter! Ta kontakt med Randi Angelsen randi.angelsen@nss.nl.no tlf 00 47 75 52 59 93 eller Åshild Opøyen aao@nfk.no tlf 00 4775 52 72 02

FLISER
Pensionist søger mindre indedørs flisearbejde.
Tlf. 228058

ARBEIÐI SUM BILFØRARI
25 ára gamal maður søkir arbeiði sum bilførari. Havi koyrikort til lastbil. Alt hevur áhuga.
255010

GREVSTUR
við minigravimaskinu. 800kg/70cm breið á beltum, har størri maskinur ikki sleppa til, t.d. útgrevstur í kjallarum ella har flutningur við tyrlu er neyðugur - urtagarðar og tún.
Tlf. 217507

ARBEIÐI YNSKIST
15 ára gamal drongur ynskir arbeiði í Havn eftir skúlatíð og í summarfrítíðini. Alt hevur áhuga.
Tlf. 252144

ALT FYRIFALLANDI ARBEIÐI
verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

Barnaansing

ER NAKAR,
sum kann ansa soni okkara, sum er 12 mán. Meguleiki er fyri at ansa honum heima hjá okkum.
Tlf. 227469/315623

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR TIL SØLU
1 ára gamal barnavognur við babylift, tasku, regnslag og fluguneti til sølu fyri 1.500 kr. Nýprísur 2.850 kr. Lítið brúktur.
Tlf. 443263 Tove

TIL SØLU
Babyllyftin, blá og vælhildin, botnur, madrassa og betrekk fylgja við, til sølu fyri 300 kr. Sum nýggj ammipúta til sølu fyri 100 kr. Verður selt saman ella hvør sær.
Tlf. 314624 ella 215353

TIL SØLU
Gráur Brio barnavognur v/ babylyft og systkinasetri 1.000 kr. Rimasong, ljóst træ, flytbarur botnur 500 kr.
Tlf. 371474 aftaná kl. 16.00

BARNAVOGNUR
Vælhildin grønur »Odder« barnavognur við tilhoyrandi babylift og madrassum til sølu.
Tlf. 311688

TIL SØLU
Brio koyristólur við føroyskum posa og ein bilstólur fyri 3.000 kr. Sær út sum nýtt.
Tlf. 319726 ella 260385

TIL SØLU
Simo koyristólur við galesju, 1.500 kr. Koyristólurin er myrkabláur við reyðum og grønum mynstri. Kurv, innkeypsnet og regnskjól fylgir við.
Tlf. 312963

SIMO KOYRISTÓLUR
ein myrkabláur koyristólur við posa og regnslag til sølu.
Tlf. 371042

VOGNUR YNSKIST
Odder barnavognur við knekk hondtaki ynskist. Ikki combi.
Tlf. 315758

Bátaútgerð

TIL SØLU
10-mannafar við fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 214032

TIL SØLU
Ein neystagrund og spæl til sølu í Vági.
Tlf. 373997

MOTORUR TIL SØLU
Ford Dolphin 120 hk. Borg-Warner gear, AS7-73G, 2:1. Í góðum standi.
Tlf. 318286 ella 218286

TIL SØLU
Bátamotorur ARONA 31 HK við breki, og nakað av nýggjum eykalutum til sølu.
Tlf. 313197

KAPPRÓÐRABÁTUR TIL SØLU
Keyp mest vinnandi 6-mannafar. Jarnbardur er bygdur av Sámali Joensen í 1990. Mynd á www.krf.fo undir tíðindi - 20 tey seinastu. Hoyr meir á tlf. 310055/250118.
jannie_d@hotmail.com

Bingo

GOTT BINGO
Gott matbingo verður í Framtíðini mánadagin tann 15. apríl kl. 19.30. Høvuðsvinningur: 500 kr. á lutaseðli.
7 fl. í Vágs skúla

OYGGJABINGO
Hey suðuroyingar. Rimmar oyggjabingo verður í skúlaheillini mánakvøld-ið 29/04 kl. 19.00. Full pláta 500 kr. og annars góður rekkjuvinningur. Høvuðsvinningur á lutaseðli: 2 harmonikutúrar fyri tvey. Annars: Olja, bensin, ræstur fiskur, flak, saltkjálkar og gávukort.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
Tvøroyrar Klubbi hevur bingo leygarkvøldið 13. apríl kl. 20.00. Á lutaseðli ein Apex ferðaseðil til Keypmannahavnar.
Nevndin

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 11. apríl kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

GOTT MATBINGO
Gott matbingo verður í Pálsstovu 14. apríl kl. 16.00.
Streymastuðlar

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 14.04 kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli: Gávukort frá Smyril Line á 2.500 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Starvsmannafelagshúsinum, J. H. Schrøtersgøta mánakvøldið 15/04 kl. 19.00. Full pláta 400 kr. M.a. á lutaseðlum: 2x1.000 kr., 2x500 kr. 15 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

BINGO
Gott bingo verður í bygdahúsinum á Strondum leygardagin 13/4 kl. 16. Drigið verður millum spølini. Á lutaseðli 15 vinningar. Høvuðsvinningur: Ein vikuskiftisflogferð til DK. Eyka spæl. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kíwanisfelagið Rósan

BINGO
verður leygarkvøldið 13. apríl kl. 19.00 tvey eykaspøl.
Kaggin

RISABINGO
til frama fyri ferð til PartilleCup í Svoríki, verður í fróttarhøllini á Hálsi leygardagin 20. apríl kl. 15.00. Nógvir góðir vinningar, m. a. uttanlandsferð.
Foreldrabólkurin

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 17. apríl kl. 19.30. Full pláta: 300 kr. 10 vinningar á lutaseðli, m.a. 2 ferðir, 500 kr.
Felagið Stóra pakkhús

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsum og í sølubúðum um alt landið. Tú sær beinanveg um tú hevur vunnið.
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

BINGO
verður í EB-húsinum á Eiði mikudagin 10. apríl kl. 19.30. Lutaseðlar verða seldir m.a. ein turkitrumla verður at vinna.
Tlf. 423201

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 11. apríl kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2x500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 15. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
N.S. Hansen & H. Marker, Grundbog i biologi I, Økologi kr. 50,- N.S. Hansen & H. Marker, Grundbog i biologi II, Menneskets biologi kr. 50,-, Kemi 2000, C-niveau kr. 100,-, Con César, en spansk kunstners hverdag kr. 50,-Robin Williams, Dead Poets society kr. 30,-, Oscar Wilde, The Importance of Being Earnest kr. 15,-, Jacobsen & Matras, Føroysk-donsk orðabók kr. 40,-, Jóhannes av Skarði, Dansk-føroysk orðabók kr. 40,-, Føroysk Heimsatlas kr. 60,-.
Tlf. 317075

TIL SØLU
N. Mohr: Islands Naturhistorie, Keypmh. 1786 (413s.) Rasmus Rasmussen: Plantulæra; Tórsh. 1910 (128 s.) James Nicoll: An Historial and Descriptive Account of Iceland, Greenland and the Faroe Islands (360 s.).
Tlf. 311885

Býli

HANDILSHØLI TIL LEIGU
Handilshøli uml. 115 fermetrar. Liggur við høvuðsveg, rættiliga góð parkeringsviðurskifti. Vælegnað til handil og/ella skrivstovu.
Tlf. 322070/215570

TIL LEIGU
Frá 1. mai er íðbúð til leigu í Hoyvík til fólk ið ikki roykja. Kostnaðurin er 4.500 kr. um mán. við hita + 1 mán. depositum. Í íðbúðini, sum er umleið 50 m2, er køkur og stova í einum, eitt kamar, baðirúm og durur. Hevur hetta tín áhuga, so skriva til
Bill. mrk. 445

TIL SØLU
Hús í Klaksvík til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 255841

YNSKIST
Mamma við 2 smágentum ynskir íbúð á Havn.
Tlf. 254484

EIGARAÍBÚÐ TIL LEIGU
Byggiár 1990, 112 ferm. til leigu. 3 kømur, stova-køkur í einum, gangur, bryggers, 2 wc, durur, 3 seinastnevndu við varma í gólvinum. Íbúðin liggur í stovuhædd við góðum útsýni. Íbúðin er partvís møblerað. Prísuppskot 9.400 kr um mán. + ljós og hita.
Tlf. 313339 Best seint um kvøldið

HÚS YNSKJAST
til keyps í Skopun. Vinarliga ringi
Tlf. 252867

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tvær 22 ára gamlar læraralesandi, ið leita eftir einari íbúð í høvuðsstaðarøkinum.
Tlf. 222920 ella 222163

UNGT PAR
søkir íbúð í Havn, Hoyvík ella á Argjum. Roykja ikki, fara væl um. Bæði hava fast tarv og gjalda til tíðina. Vinarliga set teg í samband við okkum á
tlf. 254668 ella 214190 eftir kl. 17.30

RÆTT MÆR HOND
Trúgvandi mamma við 12 ára gomlum barni søkir eina ella aðra íbúð. Eg vil gjarna rætta tær eina hond.
Tlf. 315540 ella 316219

HÚS TIL LEIGU
Hús í Kollafirði við tveimum íbúðum til leigu.
Tlf. 421483

YNSKIST Í HAVN
Sera friðaligur 33 ára gamal civilverkfrøðingur í føstum starvi ynskir íbúð í Havn.
Tlf. 445178/227003

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par við einum barni ið sóknast eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit eru friðarlig, roykja og drekka ikki, og leggja dent á at gjalda til tíðina. Vinarliga ring
253185 ella 257745

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar, sum hevur eina íbúð at leiga/framleiga mær í tíðarskeiðinum 1. mai til 1. desember.
Tlf. 319325 ella 250550

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par við einum barni, ið sóknast eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Vit eru friðarlig, roykja og drekka ikki, og leggja dent á at gjalda til tíðina.
Tlf. 253185 ella 257745

YNSKIST
Lítil íbúð ella kamar við atgongd til køk og wc ynskist til leigu frá 1. apríl. Drekki ikki.
Tlf. 315958, spyr eftir Hans

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par við lítlari dóttur ynskir íbúð í høvuðsstaðnum. Hava fast arbeiði og fara væl um.
Tlf. 252803

KAMAR YNSKIST
Sjómaður í 30-unum ynskir kamar til leigu í Havn. Má hava atgongd til køk og bað.
Tlf. 228009 - 321646-261646

Dýr

GRÁ/HVÍT KETTA
Ein grá/hvít ketta tikin upp á kajøkinum í Kollafirði. Hevur hálsband og refleks. Kettan er hvít undir búkinum, hevur 2 gráar plettir á vinstra frambeini og undir høkuni - ógvuliga fitt og kelin. Um nakar saknar hana, vinarliga ring
Tlf. 423281 ella 222530 eftir kl. 17.00. Tove

LJÓSAGRÁUR KETTLINGUR
við onkrum ljósum bletti kann fáast við at avheinta hann. Er reinligur og dugir at eta og leppa.
Tlf. 455412

ÍSLENDSKT ROSS
Íslendskt ross ynskist til keyps.
Tlf. 251473 - 227228

DUNNUR
9 dunnupar til sølu fyri 200 kr. parið. Um tú keypir øll fært tú tey fyri 1000 kr.
Ring 442048 - 250748

HUNDAHVØLPUR
Ein 12 vikur gamal hundahvølpur verður latin djóravini. Mamman er ekta labrador.
Tlf. 457866

HUNDAHVØLPAR
Tveir sera fittir hundahvølpar undan sjefara/labradortík, vera latnir djóravini um tvær vikur.
Tlf. 441858

KETTA BURTURBLIVIN
Hálvt ára gomul ketta burturblivin við Landavegin, 30 mars. Hon hevur tjúkkan hvítan pels, gráan hala, grátt um eyguni og gráar blettir í stoðum. Um tit síggja hana, vinarliga ring
320300 eftir arb.

TARVSKÁLVAR
til sølu.
Tlf. 218101

TIL SØLU
Undulater kr. 200 pr. stk. Zebrafinker kr. 100 pr. stk.
Tlf.228058

KETTLINGAR
Tveir grá/hvitir kettligar, lagdir 28. feb. og 1. mars, kunnu latast djóravinum tá ið teir eru uml. 10 vikur gamlir.
Tlf 448435 og 224992

HVØR VIL EIGA MEG?
Eg eri ein sera fitt tík av seyðahundaslagi. 8 vikur og akti longu. Mínir eigarar mugu av við meg av serligum grundum.
Tlf. 455982 ella 455687

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Hundahvølpar undan Bordie Collie og Labrador til sølu fyri 500 kr. stk. Eru búnir at lata.
Ring 319000

Fundir

NORÐSTREYMOYAR
HANDVERKARAFELAG.
Ársaðalfundur verður hósdagin tann 18. apríl kl. 17.30 á maskinmiðstøðini í Kollafirði. Um fundurin ikki er viðtøkufurur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma aftaná.
Nevndin

ÆGIR
Ársaðalfundur verður týskvøldið 7. mai kl. 19.00 í sangstovuni.
Nevndin

HAVNAR
BJARGINGARFELAG lýsir til aðalfund 21.04.02 kl. 15.00 í hølunum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni. Nýggir limir kunnu tekna teg.
Havnar Bjargingarfelag

FRÁ TOFTA ÍTRÓTTAFELAG
Aðalfundur felagsins verður týsdagin 23. apríl kl. 20.30. Skrá sambært lógum felagsins.
Tofta Ítróttafelag

PENSJÓNISTAFELAGIÐ
í Havn hevur hugnakvøld við lutaseðlum mikukvøldið 10. apríl kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18.
Nevndin

Húsarhaldstól

TIL SØLU
6 pers. uppvaskimaskina til sølu fyri 1.500 kr. vegna keyp av størri.
Tlf. 442198 eftir kl. 18.00

FRYSTIBOKS
Vestfrost frystiboks 250l. til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 314421

TIL SØLU
Lítið brúktur Voss komfýrur við luft til sølu fyri kr. 3.000,-
Tlf. 316817 eftir kl. 18

Innbúgv

SKÁP TIL SØLU
Skáp. sera væl innrættað við skrivaraborði, hyllum og plássi til ymiska skrivstovuútgerð, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315554

TIL SØLU
Songin er væl viðfarin, hvítt træ, knapt 2 ára gomul. Støddin er 180 x 200 cm. Útskorin galvur við høvda- og fótalagið. Bestu madrassur, og topmadrassin er í einum. Songin er keypt í Idéhúsinum fyri uml. 9.000 kr., alt verður nú selt vegna plásstrot fyri 5.000 kr., ella hægstbjóðandi.
Tlf. 314624 ella 215353

TIL SØLU
3-pers. dygdarsofa, grønlandsull, í góðum standi, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 261041

TIL SØLU
Massivt stovuborð úr furu, stødd 140 X 80 cm, hædd 50 cm. Verður selt fyri 1000 kr.
Tlf. 251221 ella 313596

TIL SØLU
Marmor sofaborð til sølu.
Tlf. 310174 ella 210174 eftir kl. 16.00.

STRÁSOFA
til 2 persónar, vælhildin við hyndum til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 313989/317770

HORNATELDUBORÐ
Eitt hornatelduborð - við hillum bæði uppiyvir og niðriundir borðinum - til sølu fyri 500 kr. vegna plásstrot.
Tlf. 265044

Leikur

SANDKASSI YNSKIST
Hevur onkur ein sandkassa. Helst við loki og møguliga aðrar útileikur at selja, so ring vinarliga
Tlf. 448886

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur ein góðan, vælviðfarnan dukkuvogn - helst av slagnum Brio - at selja mær fyri ein sámuligan prís?
Tlf. 316988 eftir kl. 15

Lutaseðlar

ÚTSETT
Drátturin av lutaseðlinum hjá Leiðslubólkinum - NSÍ er útsettur til 18. apríl 2002.
Leiðslubólkurin

STØKK
Hesi nr. hava vunnið: 1: 2012, 2: 2354, 3: 2065, 4: 1930, 5: 1967, 6: 2357, 7: 2289, 8: 2498, 9: 2399. Vinningarnir fáast við at ringja á tlf 441791. Takk fyri stuðulin.
Fimleikafelagið Støkk

Pløgg

LEÐURSTYVLAR
Nýggir, svartir barnaleðurstyvlar við longum leggi og høgum botni, std. 36 til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 258715

TIL SØLU
Nýggjar Nike gaggur av slagnum Zoom Air, std. 37 1/2 til sølu fyri 300 kr. (Nýprísur 600 kr.)
Tlf. 258715

BARNAKLÆDIR
til drong str. 62-80. Tvey kot til 23 mán. blátt/ráhvítt fyri 100 kr pr. stk. Beriseli - einki brúktur.
Tlf. 313989/317770

Samband

SAMBAND
Eri einligur maður í 30-unum, havi fasta inntøku. Eg sakni eina at deila upplivingar og hugna mær við. Er hetta nakað fyri teg, vinarliga send mynd við fyrsta bræv.
Bill mrk. 328

SAMBAND YNSKIST
Halló Suðuroy, Vágoy, Eysturoy ella Norðoyggjar. Er eingin einsamøll kvinna í hesum oyggjum, sum her eru nevndar. Eg eri ein maður, sum fegin vil koma í samband við eina fitta kvinnu úr hesum oyggjum. Eg eri fyrst í 60-unum. Eg hvørki drekki ella royki. Tú kann vera millum 50-60 ár. Einasta treyt er, at tú ikki er bundin av rúsdrekka - best er um tú als ikki nýtir rúsdrekka. Er hetta nakað fyri teg, so skrivað til Sosialin, Box 76, FO-110 Tórshavn.
Bill. mrk. 690

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein íslendskur maður, síðst í 30-unum, búsettur í Suðurjútlandi í Danmark. Eg eri einsamallur og kundi hugsa mær at komið í samband við føroyska kvinnu í passandi aldri. Kanska blívur tað til meira enn vinskap. Hevur hetta áhuga, so ring
Tlf. 0045 21627228 Ási

Sjavs

SJAVSKAPPING
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30.
L.Í.F.

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 14. apríl kl. 18.00. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan

EYSTUROYAR CUP
Stór sjavskapping verður á Strondum leygardagin 20. apríl. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan og LÍF

Súkklur

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur eina góða brúkta dreingjasúkklu, 8-10 ár, til sølu.
Tlf. 375630/375182

TIL SØLU
Suzuki GS500 E, árg. 99, km. 8.500 til sølu.
Tlf. 220685

TIL SØLU
Honda skutari, gráur, hevur koyrt 1.800 km. Sera væl viðfarin og er 5 mán. gamal.
Tlf. 252700

SÚKKLUR
Ein nýggj, ein gomul og ein treningssúkkla til sølu.
Tlf. 264928

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Yamaha XS650 (XS1B) árg. 01/71, er í sera góðum standi og sær knasandi gott út, hevur ikki koyrt nógv og motorurin nýliga renoveraður. Hevur føroyskar plátur og stendur í Tórshavn. Tlf. 0045 51844758 eftir kl. 14.
ella 219617 kvøld/vikusk.

TIL SØLU
Dreingjasúkkla 4-7 ár. Myrkagrøn Juventus 16" 1 gearfótbremsu. Kr. 300.
Tlf. 315741

BRÚKT KNALLERT
Prutl ynskist til keyps fyri umleið 3.000 kr. Hevur tú áhuga ring á
Tlf. 372275 ella 260797

YNSKIST
Dreingjasúkkla 18-20" við fótbremsu ynskist
Tlf. 315758

Teldur

PENTIUM TELDA
Pentium telda 166 MhZ, 2 GB v/ hardisk, 16 MP, Ram 54xCD Rom, 14" skerm + mús og Canon printari 4200 bjc Bubble Color Windows 95 fylgir vi
Tlf. 316328

SPØL
World Rally Championship 2001. Sera flott spæl til Playstation 2, einans 500 kr. ella 2 spøl „This is Football 2002, saman fyri 700 kr.
Tlf. 448097

TIL SØLU
Nýggj lumma-TELDA Siemens IC35 The Unifier og Siemens IC35 The unifier SyncStationkr. 1.200,-
Tlf. 317075

CD-ROM
Ein 32 x speed CD-ROM av slagnum Samsung, er til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 310542

TIL SØLU
Spildurnýggj óbrúkt telda v. m.ø. 1000 Mhz AMD Duron, Maxtor 40 Gb HD, cd-drev, scroll mús o.s.v. selist uttan skerm. Prísuppskot 5.900 kr.
Tlf. 317376

HYGG HER
Spølini: Hitman, Fallout-Tactics, Max Payne og Project Eden til sølu fyri einans 800 kr. (PC-spøl) Ring
Ring 316261 og fái meira at vita

YNSKIST
Eg eri ein drongur, sum ynskir Nintendo 64 spøl og 2 joystik.
Tlf. 444650

TIL SØLU
Spildurnýggj telda v.m.ø. 1000 mhz Amd Duron, Maxtor 40 gb HD, CD-drev , skroll mús o.s.v., selist uttan skerm. Prísuppskot 5.900 kr.
Tlf. 317376

BÆRBAR COMPUTER
Compaq Presario 1600, 467 MHz, 184 MB ram, TFT kvalitetsskærm, knap 5 GB HD, DVD-drev, a-drev, modem, netkort, touchpad og ekstra mus, Windows XP, Word 2000, Rescue CD'er, lader, manualer og taske. God til skolebrug. 18 måneder gammel. Pris 7.000 kr.
Tlf. 371843

TIL SØLU
Ein góð skúlatelda 233MHz við 14" skermi, 64 ram, 2 GB harddisk, 16 speed cdrom, 56 modem. Teldan hevur tekstviðgerð. Verður seld fyri 2000 kr.
Tlf. 251221 ella 313596

GÓÐ SPØL
til teldu til sølu. 650 MhZ, Amd Athlon botnkort, Geforce grafikkort 192 MB ram, 30 GB Hardisk, netkort og nøkur spøl til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 254584 ella 313432

TIL SØLU
Liteon Cd-Brennari Cd-RW, 24X Write/ 10Xm Re-Write/40X CD-ROM, Burn Proof, við nero 5, til sølu fyri kr. 1500.
Tlf. 313471

YNSKIST
Er nakar, ið kann lata mær eitt kabinett, ella selja tað bíliga?
Tlf. 313471

FARTELDA
Fujitsu Lifebook fartelda til sølu. Intel Pendium II, 333 MHz, 3,2 GB, 96 MB ram, Windows 98, modem 56, netkort, microsoft office pakkan, McAffee Viruscan, cd-rom & diskettudrev. Taska fylgir við. Lítið og onki brúkt. 2 1/2 ára gomul.
Tlf. 310890

Tónleikur

FLØGUR YNSKJAST TIL KEYPS
„Minnist tú" Ichtus, „Upp á gólv" Viking Band, „Millum Frændur", Steintór Rasmussen (89), „Innkast" Ymisk (FS Vágar) fyri góðan stand kr. 500 stk.
Tlf. 448228 eftir kl. 17.30

Lýsingartekstur

_____
_____
_____
_____
_____
_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akf